## Var strævið sum væntað

Tá tú í samfullar 90 minuttir skalt stríðast við mætar menn sum Toulalan, Gourcuff, Diarra, Anelka og aðrar, er ikki so løgið, at møðin sæst á monnum eftir dyst. Og í so máta var Fróði Benjaminsen einki undantak, tá grikski dómarin hevði floytað av. – Tað var strævið, sum eg hevði væntað. Men ert tú ikki móður og troyttur eftir ein slíkan dyst, hevur tú ikki gjørt títt. Innsatsinum bilti so einki, segði Fróði, meðan hann turkaði sveittan av pannuni. – Men tað var keðiligt, at teir skuldu vinna, tí teir komu ikki til so øgiliga nógvar kjansir. Vit taptu so 0-1, og tað var eitt keðiligt úrslit, haldi eg. Tað er eg ikki nøgdur við, hóast avrikið hjá okkum nokk var gott. hil



## Litava vann á Luxembourg

Einasta av hinum londunum í okkara HM-bólki, sum spældi dyst í gjárkvøldið, var Litava, sum á útivølli spældi venjingardyst ímóti Luxembourg. Dysturin, ið var spældur á Stade Josy Barthel í Luxembourg, endaði við 1-0 sigri til litavar, sum eisini vóru á odda í hálvleikinum. Einsamalla málið í dystinum skoraði Tomas Danilevicius fimm minuttir fyri steðgin.

hil



- Seinastu tíggju minuttirnar vóru áskoðararnir rættiliga við og byrjaðu at rópa, og tað merktu vit, sigur Johan Troest Davidsen

Mynd: Jens Kr. Vang

# Høvdu fyri-reikað okkum

**Tað var ein stór uppliving hjá 21-ára gamla runavíkingingum, Johan Troest Davidsen, at spæla móti fronsku heimsstjørnunum**

LANDSDYSTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Føroyski stríðsviljin móti franskmonnunum fekk sjálvt teir gumputungu føroysku áskoðararnar upp úr setrunum. Og merktist inni á vøllinum.

- Seinastu tíggju minuttirnar vóru áskoðararnir rættiliga við og byrjaðu at rópa, og tað merktu vit, sigur Johan Troest Davidsen.

Ein slíkur dystur er jú nakað serligt fyri ein ungan leikara.

- Vit møttu jú stórum stjørnum, sum Anelka, Ribery og Evra, so tað er klárt, at tað er stórt, sigur Johan Troest Davidsen.

Hann heldur við Manchester United, og tí var tað eyka stuttligt at møta Evra.

- Hann spældi nú ikki í somu síðu sum eg, men tað var stuttligt kortini, sigur Johan Troest Davidsen.

Um spælið sjálvt sigur hann, at teir høvdu fyrireikað seg upp á franska spælistílin, og tí kom tað ikki óvart á teir í so máta.

- Miðvøllurin hjá okkum kempaði eisini sera væl, og vit føla allir, at liðið er í einari framgongd. Teir komu ikki fram til nakrar veruligar málmøguleikar aðrar enn málið og so opna kjansin móti endanum av dystinum, sum Jákup bjargaði, sigur bakkurin úr NSÍ.

Hann sigur, at Brian Kerr hevur sett sín dám á venjingina og liðið, men at hann hevur so lítið grundarlag at sammeta við, tí hann var so lítið við undir fyrrverandi landsliðsvenjaranum, Jógvan Martin Olsen.

- Men tað merkist, at hann er ein stór persónligheit, sigur Johan Troest Davidsen.

Og nei. Hann fekk ikki troyggjuna hjá Evra.

- Nei, onkur var longu farin avstað við henni. Eg stóð beint við síðuna av Nicolas Anelka, tá dysturin varð bríksladur av, so eg fekk hansara troyggju í staðin, sigur Johan Troest Davidsen, sum leikti ein sera góðan dyst móti stóru fronsku stjørnunum.

# Rósar teimum ungu

**Fyrrverandi landsliðsvenjarin, Jógvan Martin Olsen, fegnaðist um føroyska avrikið og var serliga fegin um tað, teir ungu menninir vísa á liðnum**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

– Hetta var eitt fantastiska gott avrik, og yvir alla linjuna gjørdu allir tað gott. Kanska hava vit hepni við okkum í einum tveimum førum, men samanumtikið kunnu vit vera errin av avrikinum, tí her var rættiliga stórur prísmunur, um vit settu liðini upp ímóti hvørjum øðrum.

Tað staðfesti Jógvan Martin Olsen, eftir at hann í gjárkvøldið hevði verið viðmerkjari hjá Rás 2 og sostatt hevði sæð dystin ímóti Fraklandi úr einum heilt øðrum sjónarhorni, enn hann er vanur. Rásarúmið var í ovastu hæddini í FSF-húsinum, við góðum útsýnið niður yvir allan vøllin.

### Ungar dygdir

– Nógvir av hesum monnunum eru rættiliga ungir. Í verjuni hava vit Jónas og Johan, sum eru 20 ára gamlir, og Bogi í høgru síðu er eisini 20, umframt at Jóan Símun í álopinum bara er 18 ára gamal. Hesir ungu menninir hava nakrar dygdir, vit ikki hava sæð fyrr, segði Jógvan Martin eftir dystin.

– Hetta er nakað, vit hava bíðað nokk so leingi eftir, men hetta vit sóu eisini longu í dystunum í fjørheyst, at her var nakað at byggja víðari á. Tað hava teir so sanniliga víst nú og eisini í dystinum ímóti Serbia. Liðið er við at spæla seg saman og menn eru við at finna út, hvussu teir á besta hátt kunnu samarbeiða á liðnum.

Jógvan Martin Olsen hevði bara rósur at bera øllum ketunum á føroyska liðnum:

– Allir gera sítt besta, og so var tað enntá ímóti endanum øgiliga nær við, at vit fingu eitt kontramál, segði hann.

### Góð frísprøk

Nakað, royndi venjarin serliga hefti seg við, vóru deyðbóltsstøðurnar, sum bæði í fyrra og seinna hálvleiki góvu Føroyum møguleika at leggja eitt ávíst trýst á fronsku heimsstjørnurnar, ið eisini hvørja ferð komu í trupulleikar.

– Frísprøkini hjá Súna Olsen lógu heilt ótrúliga væl og tað var veruliga høgur klassi yvir teimum. Har mundu vera einar seks góðar frísparksstøður, sum Súni tók sær væl av, tí hann hevur heilt framúr góðan sparkiteknikk. Tað kundi verið øgiliga skjótt, at vit fingu eitt mál burtur úr onkrari av teimum, segði Jógvan Martin Olsen, sum hevur vónir um, at landsliðið kann fáa okkurt stig aftrat í komandi dystunum.

– Vit vita, at skulu vit hava okkurt stig aftrat, so verður tað sera torført á útivølli ímóti Serbia og Fraklandi. Og hóast eg vænti, at næsti dysturin, sum er á útivølli ímóti Eysturríki, verður sera torførur, so er tað í tí dystinum og heimadystinum ímóti Litava aftaná, at vit skulu satsa uppá at fáa okkurt stig aftrat.



Raymond Domenech og Jógvan Martin Olsen undan dystinum

Mynd: football.fo